

*Fiskimenn eru vorðnir meira bevístir um trygd á sjónum*

# Fiskimenn meira bevístir um trygd

**Danskir fiskimenn eru í dag so fokuseraðir um gott arbeiðsumhvørvi, at hetta nú eisini sæst aftur í hagtølum - við nógv færri álvarsligum vanlukkum umborð á skipum og bátum**

TRYGD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Danska Sjóferðslustýrið er komið við tølum fyri 2007 sum vísa, at einans 14 álvarsamar arbeiðsvanlukkur hendu umborð á donskum skipum og bátum í 2007. Við øðrum orðum merkir hetta, at bert tríggir av hvørjum 1000 fiskimonnum vórðu raktir av arbeiðsvanlukkum í eitt ár.

Hetta tal er nógv minni enn tølini fyri sigling í aðrari vinnu enn fiskivinnuni.

Taka vit skip niðanfyri 3.000 tons, vísa tølini, at í miðal 9,9 av hvørjum 1000 siglandi eru fyri skaðum og við skipum, sum eru størri enn 3.000 tons, er talið 6,7 í miðal fyri hvørji 1000 sjófólk.

Ein av teimum, sum fylgir væl við, hvussu gongur á hesum øki í fiskivinnuni, er Mogens Nielsen, stjóri í Fiskeriets Arbejdsmiljøråd, og hann ber fiskimonnum stórt rós.

- Fiskimenn taka trygdina í stórum álvara, og tað eru ikki onnur enn fiskimenninir sjálvir, sum taka sær av trygdini umborð á fiskiskipunum, sigur hann.

Tølini yvir arbeiðsvanlukkur umborð á fiskiskipum eru fallin í stórum stigum seinastu fýra árini..

Í 2001 og 2002 var talið av álvarsligum arbeiðsvanlukkum umborð á fiskiskipum 53. Í 2003 minkaði tað niður í 46, og í 2004 var talið 30.

Í 2005 vóru danir niðri á 27 arbeiðsvanlukkum fyri hvørjar 1000 fiskimenn – og í 2006 var talið 24.

Metstóra minkingin var í 2007, tá talið av álvarsligum arbeiðsvanlukkum umborð á donskum fiskiskipum bert var 14.

Mogens Nielsen er sannførdur um, at ein orsøk til minkingina er trygdarskeiðið, ið tekur tríggjar vikur, sum yngra ættarliðið tekur, áðrenn lagt verður út á hav.

# Eitt lítið fiskavirki millum tey stóru



**Í morgun standa 12 fólk og skera kongafisk við hond á fiskavirkinum hjá Kjartani Joensen í Leirvík. - Tá mest er at gera, eru vit eini 25 fólk til arbeiðis, tá øll eru íroknað, sigur virkisleiðarin, Jógvan Martin Hansen**

FISKAVIRKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin var ein túr fram við á fiskavirkinum hjá Kjartani Joensen í Leirvík seinnapartin fríggjadagin.

Tey vóru liðug at arbeiða fiskin, konufólkini vóru farin til hús at halda vikuskifti og teir, sum eftir vóru, ruddaðu av og vaskaðu virkið klárt til næsta dag.

Í morgun vóru tey aftur til arbeiðis á fiskavirkinum, og nú arbeiddu tey kongafisk, sum verður skorin við hond, ísaður, pakkaður í 10 kilo eskjur og sendur niður til Danmarkar við Norrønu.

Úr Danmark fer kongafiskurin víðari til ein pakkisentral í Padburg og haðani til marknaðirnar í eitt nú Bremerhaven og Bologne.

Jógvan Martin Hansen, sum er virkisleiðari, sigur, at tey plaga at arbeiða kongafisk týsdag og mikudag, sum síðan fer umborð á Norrønu hósdag.

- Vit keypa kongafiskin bæði á Fiskamarknaðinum og beinleiðis, eitt nú frá Fo-Fish og Faroe Seafood. Prísurin á ráfiskinum liggur støðugur um einar 9-10 krónur, men onkuntíð er hann nakað lægri.

## Hampilig forrætning

Virkisleiðarin sigur, at sum heild fáa tey hampiliga væl fyri fløkini, og prísurin liggur javnan um einar 40-50 krónur fyri kilo.

- Hetta veldst eisini um, hvussu nøgvur kongafiskur kemur uppá land í eitt nú Týsklandi, leggur hann aftrat.

Sum skilst á Jógvan Martini hevur framleiðslan við ísaðum kongafiskafløkum riggað rímiliga væl seinasta hálva árið.

- Nøgdin av kongafiski á marknaðinum hevur verið lutfalsliga lítil, og ein stórur partur av veiðini, sum kom upp á land, endaði í Suðuroy.

Virkisleiðarin sigur, at eini 12 fólk plaga at skera kongafisk við hond, størri helmingurin konufólk.

- Tá mest er at gera á virkinum, eru vit eini 25 fólk til arbeiði, tá øll eru íroknað, leggur hann aftrat.

## Skipaflotin

Kjartan Joensen eigur eisini trolbátarnar, Norðleiv og Birting og útróðrarbátin, Høvnina.

Vit spurdu virkisleiðaran, um tað serliga er fiskur hjá hesum bátum, sum fiskavirkið hjá Kjartani í Leirvík arbeiðir.

- Nei, her hjá Kjartani er tað so, at virki og skip eru atskild – skilt á tann hátt, at so at siga øll veiðan hjá trolbátunum og útróðrarbátinum fer um Fiskamarknaðin Før-



*Peili og Tummas eftir loknan arbeiðsdag. Teir eru samdir um, at fiskavirkið hjá Kjartani Joensen er eitt gott arbeiðspláss*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*